# Fangar á skúlabonki

**ARRESTHÚSIÐ** Tey, sum sita í varðhaldinum í Havn, kunnu fáa undirvísing og íðka ítrótt. – Vit royna at lata eygu teirra upp fyri øðrum virðum, sigur Bent Jákup, leiðari í Arresthúsinum

Randi Jacobsen




*Verðin er eitt sindur trong hjá teimum , sum sita. Tí er gott fyri fangarnar av og á at uppliva nakað annað*

Tað kann vera eitt heldur einstáttað lív at sita í varðhaldi vikur ella mánaðir, men Arrestið ghúser eitt ávíst arbeiði fyri, at fólkini ikki skulu rotna, meðan tey sita.

Roynd verður eisini at menna tey.

Tveir dagar um vikuna er Niels Nattestad í Arresthúsinum og undirvísir teimum fangum, sum eru áhugaðir fyri at læra nakað.

Tvær ferðir tveir skúlatímar eru um vikuna. Í dag er tann skúlin tó farin í summarfrí.

Umstøðurnar í Arresthúsinum eru ikki tær bestu, men tað gongur kortini. Fangarnir verða undirvístir í eini skulastovu, sum er til tað sama.

- Eg undirvísi mest í føroyskum og læri eg fangarnar ta grundleggjandi mállæruna, at benda, seta ð, um orðaflokkarnar o.s.v., sigur Niels Nattestad.

Hann undirvísir teimum eisini í rokning og matematikk.

Niels Nattestad heldur tað vera eina stuttliga uppgávu at undirvísa í Arresthúsinum. Teir flestu fangarnir tíma væl at sita á skúlabonki, ikki minst teir, sum eru komnir upp í árini.

### Ymist fyri

Tað er nokkso ymist, hvussu fangarnir eru fyri í førleika í føroyskum og rokning. Summi tímdu ikki so væl at læra, tá ið tey gingu í skúla. Onnur eru heilt væl fyri og hava studentsprógv. Hetta ger undirvísingina ikki til minni avbjóðing hjá læraranum.

- Vit hava tað eisini hugnaligt og práta um leyst og fast, sigur Niels Nattestad, sum nú hevur virkað sum lærari í Arresthúsinum í trý ár.

Bent Jákup Hansen, leiðari í Arresthúsinum heldur tað vera sera týdningarmikið at royna at halda fangunum uppi við at geva teimum vitan.

Í Arresthúsinum er eisini eitt kondirúm, og farið verður eisini við fangunum á rennibreytina ella út á bygd at íðka onkran ítrótt. Tað liggur ikki fast, hvagar farið verður.

- Vit hava haraftrat ein prest knýttan til húsið. Hann er her og hevur gudstænastu, og onkuntíð fara vit á bygd í onkra av kirkjunum, har gudstænasta ikki er tá, sigur Bent Jákup Hansen.

Tað hendir eisini, at farið verður í fjøllini ein túr við fangunum.

Summir fangar hava ongantíð verið úti í náttúruni áður.

- Vit gera tað, vit eru ment fyri at lata eygu teirra upp fyri øðrum virðum og fáa tey aftur á beint, sigur Bent Jákup Hansen.

### Nógvir misnýtarar

Fyrr vóru fangarnir onkuntíð á floti, men tað eru nógv ár síðan.

Hetta kemur av, at áður vóru flestu fangarnir fólk, sum høvdu koyrt ávirkað.

- Nú sita tey flestu fyri rúsevni ella fyri at hava framt harðskap orskað av misnýtslu. Harðskapurin kemur ofta av vantandi tolsemi millum ung, sum ofta eru blandingsmisnýtarar, sigur Bent Jákup Hansen.

Tað tekur vikur at fáa ein misbrúkara niður á jørðina aftur.

*randi@sosialurin.fo*

# Í lagi at koyra ungfólk fyri aldur

**UNG OG LØN:** Eystari Landsrættur hevur í einum rættarmáli í Danmark avgjørt, at handlar kunnu siga ungfólki upp, tá ið tey fylla 18 ár og skulu hava fulla løn

Randi Jacobsen

Vit kenna tað eisini í Føroyum, at summir handlar helst vilja hava blaðung starvsfólk, sum ikki hava rætt til fulla løn. Onkur handil her hevur sagt fólki upp, tá ið tey eru fylt 17 ár. Eftir sáttmálanum hjá Føroya Arbeiðarafelag fáa fólk yvir 17 ár fulla løn.Í Danmark er aldursmarkið 18 ár.

Danska fakfelagið HK royndi eitt slíkt mál í rættinum vegna einn mann, sum fekk sekkin í eini handilsfyritøku, tá ið hann fylti 18 ár.

Drongurin fekk lægri løn enn hini, áðrenn hann arð uppsagdur, og bæði hann og fakfelagið hildu, at hann hevði rætt til somu løn sum tey meira tilkomnu, tí hann gjørdi sama arbeiði.

Pástandurin hjá fakfelagnum var, at drongurin var aldursdiskrimineraður í løn og við at verða uppsagdur.

Men tað helt Eystari landsrættur ikki, og HK umhugsar at fara víðari við málinum. Fakfelagið heldur, at avgerðin er í stríð við ES-reglur.

*randi@sosialurin.fo*

# Faðirleys í Grønlandi hava stovnað felag

**Grønlendingar, sum eru føddir uttan fyri hjúnarlag, hava stovnað "Landsfelagið pápi"**

Randi Jacobsen

Grønlendingar, sum eru føddir uttan fyri hjúnarlag og hava útlendskan pápa, hava ikki rætt til at fáa at vita, hvør pápi teirra er ella var, og ei heldur hava teir rætt til at arva hann.

Hetta er galdandi fyri tey, sum eru fødd fyri eitt ávíst ár, alt eftir hvar í landinum tey búgva. Lógin varð ikki broytt samstundis í øllum landinum.

Tað er ein stórur flokkur av fólki, tí í 50-, 60- og 70-árunum var hópur av donskum (og føroyskum) handverkarum og arbeiddi í Grønlandi, og nógv útlendsk skip komu inn.

Eftir at Anne Sofie Hardenberg seinasta heyst gav út bókina "Kampen for en far", varð stig tikið til at stovna felag, og mikukvøldið í seinastu viku varð felagið Kattuffik Ataata stovnað. Navnið merkir Landsfelagið pápi, veit grønlendska útvarpið.

Forkvinna í felagnum er Tida Ravn.

Lars Løkke Rasmussen, forsætisráðharri í Danmark hevur boðað frá, at støðan hjá teimum løgfrøðiliga faðirleystu grønlendingunum skal kannast.

*randi@sosialurin.fo*